

*Tað er framvegis ivamál um, hvør skal leiða Listasavn Føroya. Fjórði fundurin um setan av nýggjum leiðara skuldi verða mánakvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Dregur út við listaleiðara

**Fundarrøðini hjá stýrinum fyri Listasavn Føroya heldur fram, uttan at tað higartil hevur eydnast at seta nýggjan leiðara fyri savnið**

LISTASAVNIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ósemjan í stýrinum fyri Listasavnið er seiglívað, og eftir tríggjar fundir um setan av nýggjum leiðara hevur tað ikki eydnast at gera eina niðurstøðu. Mánakvøldið skuldi ein nýggj roynd gerast.

Tað var millum jóla og nýggjárs, at fyrsti fundurin um at seta nýggjan leiðara fyri Listasavnið varð hildin, og tá vildi eini meiriluti – tríggir av fýra limum – seta Helga Fossádal í starvið. Nevndirnar fyri Myndlistafelagið og Listafelagið høvdu báðar stillað Helga Fossádal inn til starvið, og hesari innstilling tók meirilutin í stýrinum undir við.

### Formaðurin ímóti

Formaðurin í stýrinum fyri Listasavnið, Gunnar Hoydal, er ímóti hesi innstilling, tí hann heldur, at kravið til leiðaran er, at hann skal hava listfrøðisliga útbúgving, og tað hevur Helgi Fossádal ikki, hóast hann hevur verið virkin í føroyskum listaumhvørvi í nógv ár og áður hevur verið fyribils leiðari fyri Listasavnið.

Fyrst legði Gunnar Hoydal málið fyri Mentamálaráðið, sum hann umboðar í stýrinum, men Mentamálaráðið hevur ikki viljað blandað seg upp í stríðið.

### Meta um krøvini

Síðani hevur verið tosað um at fáa ein løgfrøðing at meta um krøvini í starvslýsingini fyri at vita, um tað er avgerandi fyri starvssetanina, at leiðarin skal verða listfrøðingur.

Triði fundurin í fundarrøðini hjá stýrinum fyri Listasavnið var sunnudagin, men hann endaði ikki við nakrari niðurstøðu, uttan at nýggjur fundur skuldi verða mánakvøldið.

Fólkini í stýrinum fyri Listasavnið eru Gunnar Hoydal, sum er formaður, Heðin Mortensen, sum umboðar Tórshavnar býráð, Astri Luihn umboðar Myndlistafelagið og Malan Marnersdóttir umboðar Listafelagið.

# Nú er Guðrun til reiðar

**Guðrun Sólja Jacobsen er klár at stíga innaftur í ljósið á danska tónleikapallinum. Hon verður við í Stjørna í eitt kvøld fríggjakvøldið, og mánadagin gevur hon nýggja fløgu út**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyska songkvinnan Guðrun Sólja Jacobsen bjóðar seg rættiliga fram á danska tónleikapallinum næstu dagarnar.

Fríggjakvøldið verður hon við í fjórða innleiðandi umfarinum í sangkappinginí Stjørna í eitt kvøld, sum Danmarks Radio skipar fyri, og mánadagin verður nýggja fløgan hjá henni at fáa í sølubúðunum í Danmark.

Guðrun Sólja fekk sítt gjøgnumbrot í Danmark, tá ið hon vann kappingina Stjørna í eitt kvøld, og síðani hevur hon fingist burtur av við tónleik – bæði í Danmark og í Føroyum.

Fyrra fløgan hjá Guðrun Sólju seldi væl í Danmark, og hóast samstarvið við hennara táverandi plátufelag ikki helt fram, so eru tað onnur, sum hava áhuga, og mánadagin kemur nýggja fløgan, Wake Up.

### Nýggja sjónvarpslýsing

Á nýggju fløguni hjá Guðrun Sólju Jacobsen er kendir sangir, sum onnur fólk hava skrivað og sungið áður. Til dømis klassikarar sum Imagine og Every Breath You Take. Harafturat hevur Poul Halberg skrivað ein nýggjan sang til Guðrun, eins og føroyska Vøgguvísan, um longu hevur verið frammi, er við á útgávuni.

Á heimasíðuni hjá Guðrun ber til at hoyra brot av sangunum á nýggju fløguni, og har ber eisini til at síggja spildurnýggju sjónvarpslýsingina, sum skal føra nýggja útgávuna hjá Guðrun fram í Danmark.

Men áðrenn føroyingar og danir sleppa at keypa sær nýggju fløguna, kann Guðrun upplivast í sangkappingini Stjørna í eitt kvøld, sum verður send SvF fríggjakvøldið frá klokkan 19.00.




*Hetta er kápan á nýggju fløguni hjá Guðrun Sólju Jacobsen, sum liggur í føroyskum og donsku sølubúðum mánadagin*

## Útreiðslurnar skulu tálmast

**Varaborgarstjórin heldur, at um gongdin í útreiðslunum hjá Klaksvíkar kommunu seinastu fýra árini heldur fram, endar heilt galið**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nýggi varaborgarstjórin í Klaksvík, Jákup Mikkelsen, ger greitt, at tað verður neyðugt at tálma útreiðslurnar hjá Klaksvíkar kommunu, tí annars endar galið.

– Tað mundi koma óvart á mong, at undanfarna samgonga tey seinastu fýra árini brúkti umleið 65 mió. meir, enn tað sum var avsett á fíggjarlógini. Sjálvandi var henda meirnýtsla fyri á býráðsfundi so hvørt, men hetta vísir hvussu trupult tað er at halda aftur í góðum tíðum, tá pengarnir streyma inn í kassan, sigur Jákup Mikkelsen, sum umboðar Fólkaflokkin í Klaksvíkar býráði.

Hann vísir á, at rakstrarútreiðslurnar hjá Klaksvíkar kommunu vuksu úr 43 milliónum og upp í slakar 74 milliónir frá 2001 til 2004.

– Um henda gongdin heldur fram tey næstu fýra árini, so verður heilt galið. Vit sum sita í samgongu í Klaksvíkar Býráð síggja hetta at tálma rakstrarútreiðslunum sum eina stóra og trupla, men sera týdningarmikla uppgávu, sigur Jákup Mikkelsen

– At gjara út er altíð lætt, meðan tað stramma í er altíð trupult og ópopulert – men vit sum eru vald inn at stýra Klaksvíkar Býráð mugu tora at taka avgerðir, eisini tær sum eru ópopulerar, sigur varaborgarstjórin.

- - -

## Klaksvík letur 30.000

Klaksvíkar kommuna ætlar sær at stuðla neyðhjálpararbeiðnum í Fjareystri við 30.000 krónum. Hetta tal eru býráðslimir komnir fram til, eftir at málið hevur verið viðgjørt í nøkrum nevndum hjá býráðnum.

Týskvøldið verður fyrstu reguligi býráðsfundurin hjá tí nývalda býráðnum, og tá skal játtanin til neyðhjálpina endaliga góðkennast av býráðnum.

**ek**